Landssjúkrahúsið

# Útboðstreytir

um veiting av

## frukt til starvsfólk og sjúklingar
## og
## frukt og grønmeti til køkin

til Landssjúkrahúsið

**Alment útboð**

Sbrt. Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum

Heystið 2019

**Innihaldsyvirlit**

1. Lýsing ... 3
2. Útbjóðingartilfar ... 3
3. Uppgávan – vørubólkar ... 3
4. Tíðarætlan ... 4
5. Spurningar til útbjóðingartilfarið ... 4
6. Innkeypsavtala og byrjan ... 4
7. Fyrivarni ... 5
8. Tillutanartreytir ... 5
9. Tilboðið galdandi ... 5
10. Kravfestingarlisti ... 5
11. Gjaldstreytir og hagtøl ... 6

# 1. Lýsing

Landssjúkrahúsið skal hervið biðja um tilboð uppá veitan av frukt til starvsfólk og sjúklingar, og frukt og grønmeti til køkin á Landssjúkrahúsinum.

Á Landssjúkrahúsinum arbeiða áleið 850 starvsfólk býtt í 30 starvsbólkar á ymiskum deildum.

### Útbjóðingarháttur

Alemnt útboð í samsvari við rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum *Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum*.

### Bíleggjari

Landssjúkrahúsið, Køkurin (stytt LS)
Eirargarður 5
100 Tórshavn

### Kontaktpersónur

Gudna á Rógvi Joensen
Tlf.nr.: 304500 lokal 1260
Fartelefon: 234520
Teldupostur: gudna@ls.fo

Alt samskifti millum bíleggjara og tilboðsgevara viðvíkjandi hesum tilboðsfyrispurningi skal vera á føroyskum.

Tilboðið skal fylgja ásetingunum í hesum útbjóðingartilfari. Tilboðið skal innihalda tey skjøl og útgreiningar, sum biðið verður um í samlaða útbjóðingartilfarinum.

Um skjøl og annað vanta í tilboðnum, kann hetta føra við sær, at tilboðið ikki verður tikið við í tilboðsviðgerðina.

# 2. Útbjóðingartilfar

Tað samlaða útbjóðingartilfarið fevnir um:

- Útboðstreytir

- Fylgiskjal 1 – Kravfesting
- Fylgiskjal 2 – Tilboðslisti - frukt og grønmeti til køkin
- Fylgiskjal 3 – Vekting
- Fylgiskjal 4 – Veitingaryvirlit viðv. frukt til starvsfólk og sjúklingar
- Fylgiskjal 5 – Veitingaryvirlit viðv. frukt og grønmeti til køkin
- Fylgiskjal 6 – CSV-fíla

Í fylgiskjalið 1 síggjast treytirnar ið skula vera uppfyltar fyri at tilboðið kann góðtakast.

# 3. Uppgávan – vørubólkar

Innkeypsavtala verður gjørd grundað á tilboðið og tilboðstilfarið við fylgiskjølum. Tilboðsgevarin er bundin av sínum tilboði í síni heild alt avtalutíðarskeiði íroknað optiónir.

Avgerðin verður tikin, so at LS fær tann besta prísin og góðskuna í mun til krøvini, sum uppgávan ásetur. Soleiðis verður stórur dentur lagdur á prís, góðsku og variatión/skiftandi

kassainnihald. Tann, sum fær avtaluna, skal lata eina csv-fílu við mettum prísum við avtalubyrjan. Krøv til csv-fílu – sí fylgiskjal 6.

**Talan er um 3 vørubólkar:**

1. Frukt til starvsfólk og sjúklingar
2. Frukt og grønmeti til køkin

Uppgávan fevnir sostatt um keyp og vøruútbering av 1) fruktkassum til starvsfólk og sjúklingar og 2) frukt og grønmeti til køkin á Landssjúkrahúsinum. Sí fylgiskjøl 4 og 5 viðv. veitngarstøð, veitingardagar og veitingartíðir.

Landssjúkrahúsið ynskir at gera sáttmála við 1 veitara.

Upplýstu mongdirnar í tilboðslistunum er eitt mett árligt keyp, ið byggir á samlaða keypið í tíðarskeiðinum 1. september 2018 til 31. august 2019. LS er ikki bundin av øðrum enn faktiska keypinum í avtalutíðarskeiðinum.

Bjóðast skal upp á báðar bólkarnar. Viðmerkjast skal, at deildirnar P40, A2 og G3 fáa framvegis sjúklingafrukt saman við starvsfólkafruktini.

Tilboðsgevarin ber allan kostnaðin fyri tilboðið og møguligar vøruprøvar, og tað verður ikki sent aftur til tilboðsgevaran.

# 4. Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| Kunngerðing av útboðstilfarið | 8. oktober 2019 |
| Spurnarfreist | 17. oktober 2019, kl. 12.00 |
| Tilboðsfreist | 28. oktober 2019, kl. 12.00 |
| Vinnari kunngerðast | Ultimo oktober 2019 |
| Sáttmálin samtyktur | Primo november 2019 |
| Sáttmála byrjan | 1.1.2020 |

Tilboð, ið eru latin inn ov seint, verða ikki tikin við í tilboðsviðgerðina.

Viðmerk tilboðið "Fruktkassar og køksveitingar"

# 5. Spurningar til útbjóðingartilfarið

Um tað eru viðurskifti ella krøv, sum tykjast ógreið, órímilig, torfør at uppfylla ella lýst á ein ófullfíggjaðan hátt, mælir Landssjúkrahúsið til, at tilboðsgevarar seta spurningar til útbjóðingartilfarið.

Møguligir spurningar til útbjóðingartilfarið skulu sendast skrivliga við telduposti til gudna@ls.fo so tíðliga sum gjørligt, og innan hin 17. oktober 2019 kl. 12:00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga í seinasta lagi tann 17. oktober 2019. Spurningar og svar verða almannakunngjørd í navnleysum sniði á Keypsportalinum.

# 6. Innkeypsavtala og byrjan

Miðað verður eftir, at avtalutíðin er fyri tíðarskeiðið 1. januar 2020 og 1 ár fram við optión upp á 2 x 1 ár. Ætlandi byrjar veitingin til Landssjúkrahúsið í viku 1 í 2020.

Innkeypsavtalan kann uppsigast av Landssjúkrahúsinum við 3 mðr. freist til hin 1. í mánaðinum. Orsøkin til, at Landssjúkrahúsið letur upp fyri eini møguligari 3 mðr. uppsókn

við veitaran skyldast, at henda avtala er sera tengd av dagsprísum og avsláttri hjá veitara. Sæð í tí ljósinum av, at prísirnir innan hetta økið regluliga broytast, so ynskir Landssjúkrahúsið eitt samstarv við veitara ið byggir á álit framum eftirlit hvat prísjavning viðvíkur.

Um grov brot verða gjørd, verður avtalan uppsøgd uttan ávaring. Hetta er galdandi fyri báðar partar.

# 7. Fyrivarni

Møgulig fyrivarni um veitingar ella annað skulu vera greitt tilskilað í tilboðnum. Fyrivarni skulu greitt vísa til tað petti í tilfarinum, sum fyrivarni verður tikið fyri.

# 8. Tillutanartreytir

Í metingini av tilboðunum verður vektingin býtt sum:

- 40% til frukt til starvsfólk og sjúklingar
- 60% til frukt og grønmeti til køkin

**Frukt til sjúklingar og starvsfólk**:
40% eftir hjálagda stigatalvu við frágreiðing

**Frukt og grønmeti til køkin**:
60% eftir hjálagda stigatalvu við frágreiðing

Sí fylgiskjal 3 har vektingin er nærri lýst.

Bíleggjari skilar sær rætt til ikki at velja nakað av innkomnu tilboðunum, t.d. um mett verður, at einki teirra lýkur krøvini.

# 9. Tilboðið galdandi

Tilboðið skal vera galdandi í minsta lagi 3 mánaðir eftir tilboðsfreistina tað vil siga í minsta lagi til 1. mars 2020.

# 10. Kravfestingarlisti

Tilboðsgevarin skal viðfesta svar uppá niðanfyristandandi punktir við tilboðsgevan:

- Prísir uppá fruktkassar, sí fylgiskjal 1 - Kravfesting
- Yvirlit og dømir við fruktkassum, ið avspegla árstíðirnar
  herundir hvussu skift verður millum kassarnar (hetta fyri at fáa lýst breidd og dýpd av tykkara samlaða vøruúrvali, herundir frukttypir og fruktsortir, og tær ymsu støddirnar og slag/týpa av fruktkassum)
- Lýsing av bíleggingarskipan (bíleggingar, bíleggingarfreistir fyri viku ordra, avboð, rætting, broyting av tal av fruktum o.a.)
- Lýsing av hvussu tit tryggja góðskuna, undir hesum goymsla, vøruflutningur, handfaring, val av undirveitara o.a.)
- Hvussu tykkara kundatænasta er hugsa, undir hesum handfaring av kærum og hvussu tit handfara seinkan
- Hvørjir kassar verða nýttir til kassaveitingar
- Tilboðslisti, herundir lýsing av kalkulatiónshátti / avsláttarskipan
- Avrit av fylgiseðli

Tað vektar positivt, at tilboðsgevarin kann veita eitt breitt og djúpt vøruúrval av fruktum, at vøruúrvali broytist eftir árstíðum bæði hvat viðvíkur frukttypur og fruktsortir, og at kassarnir er innbjóðandi og nossligir, og at tit kunnu tryggja høga góðsku.

# 11. Gjaldstreytir og hagtøl

Fakturering fer fram elektroniskt til EAN nummar 5797100000058. Gev gætur at frukt til starvsfólk skal fakturerast fyri seg og frukt til sjúklingar skal fakturerast fyri seg, og frukt og grønmeti til køkin skulu fakturerast fyri seg – tvs. til hvør sína debitorkonto.

Fakturin verður stílaður til:

Landssjúkrahúsið
J.C. Svabosgøta
FO 100 Tórshavn

og skal upplýsa, hvar vøran er veitt (starvsfólka-/sjúklingafrukt ella frukt/grønmeti til køkin) umframt vanligar upplýsingar so sum vørulýsing, -nøgd, prís, gjaldstreytir o.s.fr.

Hvønn ársfjórðing verður ein hagtalsfíla at senda til køkin, ið lýsir sølu / keyp í ársfjórðinginum. Evstamark at senda hagtølini er 10 arbeiðsdagar eftir loknan ársfjórðing. Miðað verður eftir, at allir fakturar eru avgreiddir um hetta mundið, og at ongar rættingar koma eftirfylgjandi.

Veitarin skal senda Landssjúkrahúsinum samlifaktura hvørja viku.